| **Heiti á verkætlan**:<br>Makreltrol uttan breidlar | **Ár byrjan og endi**:<br>2021 - 2023 |
|---|---|
| **Skrivað hevur**:<br>Navn:<br>Stovnur ella virki:<br>t-postur: | <br>Frederik Hansen<br>Vónin P/F<br>fh@vonin.com |

**Endamálið við verkætlanini**:
Fiskiskapurin eftir makreli í Føroyskum sjógvi er broyttur sera nógv seinastu árini. Fyrr vóru stór og tung makreltrol brúkt, tí makrelurin fyrr stóð í stórum torvum, har tað var lætt at fáa makrelin í trolið, og tað tí snúði seg um, at trolið megnaði at svølgja stórum nøgdum skjótt. Seinnu árini, frá umeið 2019 og fram til nú, hevur verið minni av makreli í føroyskum sjógvi, og makrelurin hevur verið sera spjaddur og hartil bert verið heilt uppi í yvirfladuni. Hetta hevur ført við sær, at tað nú er nógv verri at fáa makrelin í troli.

Tað verður mett, at lemmarnir eru við til at reka makrelin inn í trolið. Frá lemmunum og aftur til trolið eru vanliga tveir Dyneema breidlar hvørju megin. Hesir eru sum oftast 80 metrar. Her er tí eitt sera stórt økið, har makrelur kann sleppa út ígjøgnum, serliga tá snarað verður undir toving. Tá trolað verður eftir makreli er vanligt at snara ofta og nógv. Tí hava skiparar tosa við okkum á Vónini um hetta, um tað ikki er møguligt at gera okkurt, so makrelur ikki fer út millum lemmar og trol, serliga tá snarað verður.

Vónin gjørdi eitt uppskot útfrá hesum fyrispurningum. Tað, sum bleiv gjørt, var at seta meskar í breidlarnar, heilt frá trolinum og heilt fram til lemmarnar. Líka langt sum longdin á breidlunum, tvs 80mtr. Við hesi loysn meta vit, at makrelurin verður rikin inn aftur í trolið, sjálvt tá snarað verður. Við hesum skal effektiviteturin økjast, tí at trolið rekur makrelin betri og harvið fiskar betri. Vit vita ikki um, at nakað annað trolvirkið hevur roynt hetta fyrr. Í øllum førum ikki til makreltroling.

**Samandráttur av úrslitum**:
Av tí at bert kr 400.000,- blivu játtaðar, ið er minni enn helvtin av tí, søkt var eftir, so var ikki møguligt at gera eitt nýtt trol til endamálið. Tí valdu vit at umbyggja eitt makreltrol, sum Vónin átti. Hetta var eitt 1920 mtr hex makreltrol, ið vit mettu egnaði seg væl til endamálið. Fleiri tekningar og teldusimuleringar blivu gjørdar, og vit gjørdu eisini eitt modelltrol, so vit kundu síggja trolið í SINTEF royndarbrunninum í Hirtshals.

Vónin gjørdi avtalu við uppsjóvartrolaran Borgarin til at royna trolið. Teir fóru út fyrstu ferð 3. juli 2021. Tað gjørdist beinanvegin greitt, at trolið riggaði sera væl. Tað var lætt at tova og var gott at arbeiða við, hóast trolið er uppbygt uppá ein heilt øðrvísi máta enn vanligt. Vit gjørdu nakrar tillagingar fyrstu tíðina, t.d. var ikki líka lætt at seta uppdrift/boyur á vengurnar á trolinum. Hetta loystu vit við at seta segl á frammi í veinginum. Tað var eingin ivi, at eftir teir fyrstu túrarnar kundi sigast, at tað gekk væl at fáa makrel í trolið. Soleiðis sum fiskiskapurin hevur verið eftir

makreli seinastu árini, er sera torført at seta orð og serliga tøl á, um eitt trol fiskar betri enn onnur. Men útfrá afturmeldingun frá serliga Borgarinum, men  eisini teimum skipum, ið seinni hava keypt hetta serliga trol, so eru vit ikki í í iva um, at trolið roynist sera væl. Vit sóu longu eftir tí fyrstu sesongina í 2021, at trolið riggaði somikið væl, at vit fóru undir at menna tað enn meira og bjóða tað fram til onnur skip. Hendan verkætlan hevur verið við til at økja um søluna av makreltrolum, ið eru ment og framleidd av føroyskum virki.

| | |
|---|---|
| **Váttan/undirskrift frá verkætlanarleiðara**: |  |